

*Tilsamans 72 luttakandi fyritøkur vóru við á FaroExpo í ár, harav umleið 20 útlendskar. Hinar vóru allar føroyskar*

Mynd: Vilmund Jacobsen

**... eftir afturgongd, kemur fyrr ella seinni aftur framgongd...**
LØGMAÐUR

uppi í Atlantarhavinum.

– Vit hava lært okkum at navigera í ringum sjógvi, og vit hava lært at laga okkum til skiftandi búskaparligar veruleikar, legði hann aftrat.

Kaj Leo vísti á, at náttúran hevur síni egnu sveiggj við góðum og minni góðum árum.

– Soleiðis er eisini við marknaðum. Eftir afturgongd, kemur fyrr ella seinni aftur framgongd. Hetta er eisini avbjóðingin við at reka eina fyritøku. Tað, sum er eyðkenni fyri góð vinnulívsfólk, er evnini til at umstilla seg og stýra millum sker og at vita, nær segl skulu setast – ella repast. Evnini at brúka møguleikar – ikki minst í niðurgangstíðum – skapa succes-ríkar vinnufyritøkur, sum hann tók til.

### Ein marknaður

Løgmaður vísti á, at globaliseringin hevur broytt fyritreytir og umstøður hjá okkum sum samfelag og einstaklingar.

– Heimurin er vorðin ein marknaður, har allar vinnufyritøkur – stórur sum smáar – hava møguleikar at gera seg galdandi. Men kappingin er hørð – ikki minst mótvegis londum við lágum lønum og framleiðslukostnaði.

Kaj Leo Johannesen segði, at skulu vit framhaldandi megna at standa okkum í kappingini í globaliseraða heiminum, verður tað við at deila vitan og við væleydnaðum vinnuligum samstarvi.

– Eg havi tí stórar vónir til eina slíka vinnustevnu sum hesa, har møguleikar eru at byggja upp samstarv og skapa møguleikar fyri menning og vøkstri, segði hann.

Løgmaður segði seg eisini fegnast um, at stigtakararnir hava knýtt FaroExpo at eini mentanarviku.

– Vinnulív og mentan kunnu fáa stórt gagn av hvørjum øðrum, og duga partarnir at samstarva, eru góðir møguleikar fyri at skapa "win-win" støður fyri báðar partar. Saman kunnu vinna og mentan skapa málini, sum nógv søluátøk eisini eru dømi um, legði hann aftrat.

### Fylgja fiskifrøðini

Kaj Leo Johannesen segði seg serliga fegnast um, at fyrireikararnir av FaroExpo hava valt burðardygga fiskivinnu til yvirskrift til ráðstevnuna, sum verður í Løkshøll í Runavík nú seinnapartin í dag.

– Skulu vit røkka optimalum rammum fyri økologiskan og biologiskan burðardyggleika í okkara fiskivinnupolitikki, noyðast vinnulív, vísund og politiska skipanin at samstarva.

Løgmaður segði, at eftir hansara tykki hava partarnir í størri mun enn áður fingið eitt felags forstáilsi fyri, hvussu vit fáa sum mest burtur úr okkara tilfeingi í havinum.

– Tí síggi eg eisini hesa ráðstevnu sum eitt týdningarmikið stig á rættari leið.

Kaj Leo Johannesen segði í síni setanarrøðu, at frá komandi ári er málsetningurin, at talið av fiskidøgum, sum lutað verður út til ymisku skipabólkarnar, skal samsvara við lívfrøðiligu ráðgevingina.

vilmund@sosialurin.fo

# Hotel Hafnia mettar gómarnar

**FAROEXPO Kitty Olsen, ið hevur starvast sum tænari á Hotel Hafnia í 13 ár, hevur øll árini verið við til at givið luttakarum á vinnustevnuni FaroExpo morgunmat, døgurða og kaffi**

Vilmund Jacobsen

Aftur í ár er tað Hotel Hafnia, sum hevur staðið fyri serveringini á Faro Expo, og aftur í ár er Kitty Olsen partur av hesum tiltaki.

Aftrat sær hevur hon havt Helgu Nordendal, sum er útbúgvin tænari - og Marna Ørvarodd, sum koyrdi matin av Hotel Hafnia og inn til Runavíkar.

Helga er ikki í føstum starvi á Hotel Hafnia, men hjálpir til, tá boð eru eftir henni.

Marni Ørvarodd er tað, sum rópt verður "alt mulig mand" hjá miðbýarhotellinum í Havn. Hann heintar vøru, og hann koyrir mat út til viðskiftafólk, umframt at hann eisini hevur ymiskar aðrar uppgávur, tá hotellið skal fyrireikast til fundir og annað virksemi, sum Hotel Hafnia er karmur um.



*Marni Ørvarodd, Kitty Olsen og Helga Nordendal*

Mynd: Vilmund Jacobsen

Sjálvur hevur Marni starvast á Hotel Hafnia í tilsamans 18 ár.

– Eg eri ikki bedellur, men ein partur av mínum uppgávum líkjast tí, sum ein bedellur fæst við, sigur Marni Ørvarodd.

### Dámar væl

Kitty Olsen sigur, at henni dámar væl at fáast við tænastuvirksemi, sum er partur av hesum arbeiði, og eftirhondini er hon vorðin kend við umhvørvi, sum er á vinnuráðstevnuni FaroExpo.

Seinastu fýra árini hevur hon í summarfrítíðini arbeitt á hotellinum Grand Park í Korsør í Danmark, og í ár arbeiddi hon har í tilsamans fimm vikur.

– Eg ætli mær aftur til Korsør at arbeiða komandi summar, og eg haldi, at hetta gevur mær íblástur til mítt dagliga starv sum tænari á Hotel Hafnia, sigur Kitty Olsen.

vilmund@sosialurin.fo

# 160 fólk á FaroExpo

**FAROEXPO Vinnustevnan FaroExpo er ikki ein framsýning, har almenningurin hevur atgongd. Tað eru fyritøkurnar, sum eru við á stevnuni, ið fundast sínámillum eftir klokkutíð**

Vilmund Jacobsen

Hóast FaroExpo ikki er ein framsýning ella sølustevna, har almenningurin hevur atgongd, so vóru kortini nógv fólk í Ítróttarhøllini í Runavík týsdagin og fyrrapartin í dag.

Vinnustevnan er skipað sum parteneriat, har fundarborðið er miðdepilin.

Fundirnir eru avtalaðir frammanundan og koyra eftir fastari skipan og klokkutíð. Tá ein fundur er liðugur, verður beinanvegin farið undir næsta fund, og soleiðis fáa luttakararnir á FaroExpo høvi at hitta tær fyritøkur, ið tær ynskja at fundast við.



*Símun Hammer er stjóri í Virkisráðgevingini, sum skipar fyri FaroExpo*

Mynd: Vilmund Jacobsen

Símun Hammer, stjóri í Virkisráðgevingini (VRG), sigur, at eini 160 fólk tilsamans vóru í Ítróttarhøllini í Runavík týsdagin og umleið sama tal fyrrapartin í dag.

– Tey allar flestu eru fólk, sum umboða ymisku fyritøkurnar og luttakararnar, men í onkrum føri er tað so, at fyritøkur, sum eru við á FaroExpo, biða um fundir við fyritøkur, sum ikki eru við á stevnuni.

Men hetta er undantakið.

Stjórin í VRG sigur, at dagurin í gjár eydnaðist væl, og hann væntaði eisini ein góðan dag fyrrapartin í dag.

Bæði fyriskiparar og luttakarar hava víst sítt nøgdsemi við vinnustevnuna.

– Nú gleða vit okkum til almenna partin av Faro Expo, ið er ráðstevnan við fyrilestrum í Løkshøll, sum byrjar beint eftir døgurðasteðgin í dag, sigur Símun Hammer.

vilmund@sosialurin.fo